VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 225 • mikudagur • 23. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Roknskapargreining av fiskiflota og fiskavirkjum 2000-2004



*Bjarni Poulsen hevði sjálva framløguna, meðan Sjúrður Johannesen passaði telduna við tølunum og niðurstøðunum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Við eina framløgu á Hotel Hafnia seinnapartin týsdagin legði grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe, føroyska fiskiskipaflotan undir "lupp"**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe, hava gjørt eina roknskapargreining av føroyska fiskiskipaflotanum fyri árini 2000-2004, har felagið við støði í almennu ársroknskapunum umframt eykaupplýsingum hevur greinað roknskapartølini fyri hesi árini.

Á hvørjum ári seinastu árini hevur felagið skipað fyri framløgu av úrslitunum, sum komið er fram til, fyri viðskiftafólkum.

Framløgan av roknskapargreiningini av fiskiskipaflotanum var týsdagin, og aftur í ár var Sosialurin við til framløguna, sum hesaferð var á Hotel Hafnia.

Rasmussen & Weihe hava eisini gjørt eina tilsvarandi roknskapargreining av flakavirkjunum fyri árini 2000-2004, og eisini í hesum førinum byggir greiningin á almenn roknskapartøl umframt eykaupplýsingar frá virkjunum.

Á framløgufundinum týsdagin var størsti denturin lagdur á fiskiflotan, men við endan av fundinum varð tikið saman um gongdina hjá fiskavirkjunum.

Fyri at dekka útreiðslurnar, sum Rasmussen & Weihe hava av greiningini, tekur felagið 4.000 krónur umframt mvg fyri hvørja luttakandi fyritøku, sum við hesum eisini fær skrivligt tilfar útflýggjað, sum lýsir gongdina.

Fyritøkur, sum ikki eru við til framløguna, kunnu fáa tilfarið sendandi, og tá er kostnaðurin eisini 4.000 krónur.

Rasmussen & Weihe bjóða sær eisini at koma á vitjan hjá fyritøkum og halda eina framløgu eftir nærri avtalu við fyritøkuna, og tá er kostnaðurin 12.000 krónur umframt mvg.

Greiningin, sum fevnir um meginpartin av fiskiskipaflotanum, er býtt upp hesar bólkar: 1) Allur flotin, 2) Pelagisk vinna, 3) Rækjuvinna, 4) Verksmiðjutrolarar, 5) Partrolarar, 6) Lemmatrolarar, 7) Línuskip, 8) Garnaskip og 9) Onnur skip.



*Klaus Rasmussen var eisini millum luttakararnar til framløguna týsdagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Fiskiskipaflotin:

# Árið 2005 helst lakari enn 2004

**- Roknskapargreiningin fevnir ikki um 2005, men tað eru ábendingar um, at árið í ár verður lakari enn 2004 hjá teimum flestu skipabólkunum, heldur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í roknskapargreiningini yvir fiskiskipaflotan, sum Rasmussen & Weihe hava gjørt, eru – við fáum undantøkum – øll skip tikin við, sum eru omanfyri 110 tons ella hava eina maskinorku, sum er størri enn 400 hk.

Hetta er sambært flokkingini av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Aftrat almennu ársroknskapunum hjá teimum feløgum, sum eiga skipini, hevur grannskoðarafelagið eisini fingið upplýsingar um veiðinøgd, nettosølu og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri heildarmyndina.

Útróðrarflotin er ikki við í greiningini, tí tað eru bert fáir bátar, sum eru skipaðir í partafeløg ella smápartafeløg við skyldu at lata inn almennan ársroknskap.

## Egnar niðurstøður

- Í greiningini hava vit lagt dent á at lýsa gongdina hjá hvørjum einstøkum skipabólki hesi 5 árini. Fyri at fáa eina heildarmynd av fiskivinnuni, hava vit somuleiðis valt at leggja tølini fyri allar skipabólkar saman, sigur grannskoðarafelagið.

Felagið vísir á, at denturur er lagdur á at geva teimum, sum lesa tilfarið, møguleikan fyri at gera sínar egnu niðurstøður.

- Taltilfarið er rúgvusmikið og kann greinast í ymsar ættir, men vit kunnu staðfesta, at sera stórar broytingar eru farnar fram árini, 2000-2004.

Rasmussen & Weihe ásanna, at fiskiskipaflotin sum heild hevur havt eina stóra framgongd í tíðarskeiðnum, 2000-2001, men árini 2002, 2003 og 2004 hevur gingið støðugt aftur.

- Afturgongdin er stór frá 2001 til 2002 og frá 2002 til 2003.

Felagið ásannar, at afturgongdin í fiskivinnuni er høvuðsorsøkin til, at støðuga framgongdin í búskapinum er vend til eina afturgongd.

- Roknskapargreiningin fevnir ikki um 2005, men tað eru ábendingar um, at árið 2005 verður lakari enn 2004 hjá teimum flestu skipabólkunum, heldur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe.